**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingur til B8

Eitt avloysarastarv vegna sjúku og barnsburðar-farloyvi á 0,8 brøk í skiftandi vaktum, er leyst til setan frá 1. apríl ella eftir avtalu til og við 31. januar 2007.

**Arbeiðsøki er í høvuðsheitum:**
- røkt og viðgerð til cardiologiskar sjúklingar
- deildin hevur pláss til 10 sjúklingar

**Krøv til umsøkjarar**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í røkt og viðgerð av cardiologiskum sjúklingum
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt, avbjóðandi og fjølbroytt umhvørvi
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- innleiðslu og upplæring

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- cardiologiskar royndir
- cardiologiska eftirútbúgving

Vegna umvælingar á B6, B7 og B8 í ár verður deildin afturlatin uml. 8 vikur. Røktarstarvfólk verða tí flutt á eina aðra deild hetta tíðarskeiðið.

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Margit Stórá deildarleiðara, telefon 304500, lokal 6068 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 9. mars 2006 kl. 12.00.
Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.

Skivlig umsókn merkt "umsókn til starv" við CV, avrit av prógvum, autorisatión, skjølum o.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

# Køkshjálp

Søkt verður eftir einum fólki at hjálpa til í køki okkara.

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag kl. 10-14.

**Keypmaðurin »úti í Grønlandi«**
**Johannes Andreasen**
Grønlandsvegur 16 · 100 Tórshavn
Tlf. 312087

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

# Frítíðaravloysarar

**Deild A kirurgisk songjardeild**

**Deild M medisinsk songjardeild**

Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsuatstøðingar/ sjúkrahjálparar

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum á songjar-deildunum A og M í tíðarskeiðnum 16. juni til 15. august 2006.

**Anæstesideildin**
Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing til anæstesideildina frá 1. juni til 31. august ella eftir nærri avtalu.

Neyðugt er við serútbúgving sum anæstesisjúkra-røktarfrøðingur.

**Skurðgongin**
Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing á skurðgongini frá 1. juni til 31. august ella eftir nærri avtalu.

Neyðugt er við kunnleika og royndum innan økið.

**Nærri fæst at vita um størvini frá:**
Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu, tlf. 455463 lokal 106 ella teldupostur fyristodukvinna@ks.fo

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsókn, saman við prógvi og autorisatión, verður sent til:

**Umsjónarmannin**
**Klaksvíkar Sjúkrahús**
**FO-700 Klaksvík.**

Umsóknarfreist 24. mars 2006.

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

# Bioanalytikarar

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysara fyri bioanalytikara í tíðarskeiðnum 1. juni 2006 til 31. august 2006.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til rannsóknarstovuna tlf. 455463 lokal 305 ella 315.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisatión v.m., verður at senda til

**Umsjónarmannin**
**Klaksvíkar Sjúkrahús**
**FO-700 Klaksvík.**

Umsóknarfreist 12. mars 2006.

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar til B7

Á **B7** eru 2 avloysarastørv, vegna barnsburð, sum sjúkrarøktarfrøðingar leys at søkja til setan niðanfyri nevndu tíðarskeið ella eftir avtalu:
- á brøk 0,9 í skiftandi vaktum frá 1. apríl til og við 31. oktober 2006.
- á brøk 0,9 í skiftandi vaktum frá 15. juni til og við 31. december 2006.

B7 er ein medisinsk deild, sum tekur ímóti elektivum og akuttum sjúklingum. Deildin hevur pláss til 15 sjúklingar. Á deildini fáa sjúklingar røkt og viðgerð innan hesar læknasergreinar:
- lungnamedisin
- nefrologi
- reumatologi
- onkologi

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinska viðgerð og sjúkrarøkt
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

Vegna umvælingar á B6, B7 og B8 í ár, verður deildin afturlatin uml. 8 vikur. Røktarstarvfólk verða tí flutt á aðra deild hetta tíðarskeiðið

**Nærri fæst at vita** um størvini, við at ringja 304500 til Anniku Torbjarnadóttir, deildarleiðara, lokal 6037 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102 ella e-post asap@lsh.fo

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjar-málaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 9. mars 2006 kl. 12.00.
Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á lønar- og starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.

**Skrivlig umsókn** í brævbjálva merktur "umsókn til starv" við CV, avrit av autorisatión, prógvum og skjølum o.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

Lesið
Sosialin